UTTAN ÚR HEIMI

# Kadima kann vinna valið uttan Sharon




*Tað skortar ikki upp á góðynski til Ariel Sharon í hesum døgum*

*Mynd: Reuters*

**Nýggi flokkurin hjá Ariel Sharon kann vinna ísraelska tjóðartingsvalið, sjálvt um formaðurin ikki stillar upp**

ÍSRAEL
*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Tá Sharon legðist sjúkur, væntaðu flestu eygleiðararnir í Ísrael, at tað fór at forkoma nýggja flokki hansara, men nýggjar veljarakanningar vísa, at flokkurin fær minst líka stóra undirtøku nú, sum áðrenn formaðurin mátti leggjast undir skurð fyri heilabløðing.

Læknarnir hava boðað frá, at Sharon verður ikki tann sami aftur, og at hann verður neyvan førur fyri at halda fram í politikki. Men tað tykist ikki ørkymla veljararnar. Sambært einari kanning hjá bløðunum Maariv og Haaretz í gjár fær Kadima 44 ella 45 av teimum 120 sessunum í tinginum, tá valið verður tann 28. mars. So stóra undirtøku hevur flokkurin ikki fingið í nakrari kanning fyrr.

Kanningin ghevur Arbeiðaraflokkinum ímillum 16 og 18 umboð í tingið, meðan tann borgarligi Likud fær ímillum 13 og 15 tingmenn.

Nógvir ísraelsmenn hava ivast í, um Ehud Olmert, varaforsætisráðharri, er førur fyri at taka við eftir Sharon, men kanningarnar benda á, at ísraelsmenn hava álit á honum. Undir valstríðnum hevur Olmert talað fyri at flyta fólkið úr nøkrum niðursetubygdum á Vestara Áarbakka, men at varðveita tær flerstu bygdirnar, og tað hevur uttann iva givið honum satkvøður.

Ísraelsku læknarnir søgdu í gjár, at Sharon hevur tað betur nú, men at kann taka mánaðir at fáa staðfest, hvusu stóran skaða hann hevur fingið av heilabløðingunum.

# CIA gav Iran týðandi kjarnorkuvitan

**Fyri fimm árum síðani royndi USA at seinka iranska ætlanini at fáa sær kjarnmorkuvápn, men tiltakið kann hava havt øvugta ávirkan**

KJARNORKA
*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

USA og ES eru í øðini, tí stjórnin í Iran hevur gjørt av at taka arbeiðið á kjarnorkuverkunum uppaftur, og ES hótti í dag við at leggja málið fyri trygdarráðið hjá ST.

Men sambært einari nýggjari bók, sum eru komin út í USA, kunnu amerikanararnir kanska takka sær sjálvum fyri, at Iran er komið so langt á kjarnorkuøkinum. Í bókini verður greitt frá, at í 2000 gjørdi umsitingin hjá Bill Clinton, forseta av at lata iranum ymsar upplýsingar um kjarnokuløðingar. Men amerikanararnir høvdu lagt eina villu í upplýsingarnar, soleiðis at løðingarnar kundu ikki bresta.

Tað eydnaðist CIA at fáa ein fyrrverandi sovjetskan kjarnorkuverkfrøðing at geva iranum tær skeivu upplýsingarnar, men vanlukkutíð varnaðist hann villuna og segði iranum frá. Harafturímóti segði hann einki við CIA, og amerikanararnir vóru tí í góðari trúgv stendur í bókini.

Í bókini stendur eisini, at Iran hevði longu fingið tær røttu kjarnorkuupplýsingar úr Pakistan, men at tað er lítil ivi um, at upplýsingarnar úr USA kortini hjálptu iranum.

Tað er James Rison, blaðmaður hjá New York Times, sum hevur skrivað nýggju bókina. Hann heldur, at royndin hjá CIA at villleiða Iran er eitt tað størsta mistakið, sum amerikanska fregnartænastan hevur gjørt í nýggjari tíð.

- Vit góvu teimum kjarnorkutekningarnar í hondina, skrivar Rison.

## Rutuflúgving til Irak

Eysturríkska flogfelagið Austrian Airlines hevur sum tað fyrsta evropeiska flogfelagið gjørt av at fara undir rutuflúgving ímillum Evropa og Irak. Ætlanin er at flúgva tríggjar ferðir um vikuna, og tann fyrsta ferðin verður tann 9. mars.

Austrian Airlines ætlar at brúka floghavnina í býnum Ebril har norðuri í Irak. Umleið ein millión fólk búgva í býnum, sum er tann fjórðistørsti í landinum, og tað er eisini tann býurin, sum veksur skjótast. Austrian Airlines vísir eisini á, at ST er í ferð við at stovna eina hjálparstøð tætt við býin, og at fleiri altjóða feløg hava fingið sær skrivstovu har. Harafturat er stutt haðani til aðrar týðandi býir so sum oljubýin Kirkuk.

Flogførini hjá Austrian Airlines fara at flúgva ímillum Wien og Ebril, men leiðslan í flogfelagnum dylur ikki fyri, at hon væntar sær nógv ferðafólk úr londum sum Týsklandi, Bretlandi og Niðurlondum umframt USA og Kanada.

## Rækjur ímóti AIDS

Granskarar á Fiskeriforskning í Tromsø vilja vera við, at lívfrøðilig evni úr rækjum kunnu forða fyri, at AIDS breiðir seg í mannakroppinum. Granskararnir vísa á, at í øllum virusum eru evni, hvørs uppgáva er at gera nýggj virus, og teir vóna nú at finna evni í rækjum, sum kunnu forða hesum og á tann hátt fyribyrgja, at eitt nú AIDS kann breiða seg.

Norsku granskararnir eru í ferð við at kanna ymisk ryggleys dýr í havinum so sum rækjur, skeljar og krossfik fyri at vita, hvat teirra hevur tað neyðuga lívfrøðiliga evnið í sær. Eydnast tað at finna tað rætta evnið, skulu teir norsku granskararnir arbeiða saman við svenskum granskarum við tí fyri eyga at gera heilivág burtur úr evninum, skrivar ANB.

Fiskeriforskning hevur leingi arbeitt við at finna evni úr fiski og sjódýrum, sum kunnu brúkast innan biotøkni, og sambært granskaranum Inge W. Nilsen hava teir góðar vónir um at finna evni, sum kunnu brúkast í bardaganum ímóti AIDS.

## Drepur eldri kvinnur

Løgreglan í Mexico City leitar eftir einum manni, sum eftir øllum at døma hevur beint fyri minst 24 eldri kvinnum tey seinastu trý árini.

Maðurin bankar upp á hjá kvinnunum og sigur seg koma frá sosialu deildini hjá kommununi. Hann er altíð í konufólkaklæðum, og tað hevur víst seg, at hann dugir væl at sannføra kvinnurnar um, at hann kemur í almennum ørindum. Í hvussu er biðja kvinnurnar hann koma innar, men í minst 24 førum hevur avleiðingin verið tann, at hann hevur beint fyri kvinnunum. Onnur halda, at talan er um munandi fleiri kvinnur, og summir fjølmiðlar vilja vera við, at maðurin hevur beint fyri umleið 60 kvinnum, og at hann framdi tað fyrsta morðið longu tíðliga í nítiárunum.

Løgreglan heldur, at maðurin er um 35 ára aldur, men hóast stór løgreglulið hava leitað bæði væl og leingi, er hann framvegis ikki funnin.

## Kvinnur rændu pengaflutning

Síðani í november hevur svenska løgreglan leitað eftir nøkrum monnum, sum rændu ein pengaflutningsbil í Gøteborg, men nú heldur løgreglan seg hava prógv fyri, at minst tvær kvinnur vóru ímillum ránsmenninar.

Í gjár handtók løgreglan í Stockholm ein 36 ára gamlanmanngtværkvinnur um sama aldur, og tey vórðu alt fyri eitt skuldsett fyri at hava verið við til at ræna pengaflutningsbilin í novembur. Ránið var sera ógvusligt. Tjóvarnir hóttu flutningsmenninar við maskinbyrsum, og teir sprongdu flutningsbilin í luftina, eftir at teir høvdu tikið pengarnar og virðisskjølini úr honum.

Tey seinastu árini hevur Svøríki verið illa plagað av slíkum ránum, og í fjør vóru ikki færri enn 37 tílík rán.